

# Finnar banna royki í bilum

Finland hevur í hyggju at banna fólki at roykja í egnum bili, um børn eru í bilinum. Talan verður kortini mest um moralskan karakter, tí tað verður ikki møguligt at revsa brot á bannið. Tað er finska dagblaðið Etelä-Suomen Sanomat, sum ber tíðindini um, at finska stjórnin fer at leggja uppskot fram fyri Ríkisdagin innan fyri komandi tvær vikurnar. Lógaruppskotið verður kortini mest ætlað sum ein moralskur peikifingur, tí lagt verður upp til, at eingin kortini skal revsast fyri at roykja í bilinum, hóast børn eru til staðar. Stjórnin vísir til granskingarúrslit sum vísa, at sigarettroykur í bilum er meiri skaðiligur fyri onnur en royking í barrum og matstovum.



*- Vit kenna tað, sum eina ávísa ábyrgd at vera við, har føroysk ferðavinna bjóðar seg fram. Soleiðis hava vit saman við GreenGate Incoming eisini ein faldara, sum bæði vísir á nógvar ymiskar ferðamøguleikar og bústeðgarmøguleikar í Føroyum, sigur Maria á Lofti*

eins og lagt verður upp til, at nýggir keyparar kunnu hitta føroysku ferðavinnuna á máli.

Maria sigur, at sambært føroyskum útbjóðarum er Visit Faroe Island ein meira viðkomandi ferðavinnu-stevna enn Vestnorden Travel Mart.

## Detta niður ímillum

- Eg haldi, at tað virkar, sum Føroyar hava lyndi til at detta burtur ímillum, tá Føroyar, Ísland og Grønland bjóða seg fram saman. Kortini eru vit altíð við, tí tað ræður jú um at vera við, har okkurt kann vera at heinta, bæði millum okkara verandi samstarvspartar og møguligar nýggjar keypar-ar.

Hon leggur aftrat, at Atlantic Airways eisini kennir eina ávís ábyrgd at vera við, sum umboðandi Føroyar og føroyska ferða-vinnu í síni heild. Soleiðis hevur felagið saman við GreenGate Incoming ein faldara, sum bæði vísir á nógvar ymiskar ferðamøgu-leikar og bústeðgarmøgu-leikar í Føroyum.

- Tey fólk, sum koma til Føroya, mugu antin flúgva ella sigla. So einfalt er tað, og tí eiga vit sjálvsagt at verða við á Vestnorden Travel Mart eisini, har vit soleiðis eisini nýta høvi at kunna um Føroyar.

Hon leggur aftrat, at Atlantic Airways samstarvar við nógvar undirveitarar innan ymisku tættirnar í føroysku ferðavinnuni.

## Roynd í leikum

Maria á Lofti er roynd á sínum øki, og hon hevur starvast hjá Atlantsflogi síðan 1992. Men heilt síðan 1975 hevur hon arbeitt á flogvøllinum og var í nógv ár í starvi hjá Flogfelag Føroya, har hon eitt nú tók sær av avgreiðslu av ferða-fólki.

Hon sigur, at tað tók langa tíð, áðrenn nakar helt, at ein marknaðardeild var neyðug.

- Men so hvørt, sum Atlantsflog fór at flúgva til fleiri lond og býir, sóu vit, at marknaðarparturin hevur stóran týdning. Hinvegin var hetta kanska ikki so aktuelt, meðan flogið bert varð millum Føroyar og Keypmannahavnar.

Maria á Lofti sigur, at tað serliga var eftir at Magni Arge gjørdist stjóri í Atlantsflogi, at størri dentur fór at verða lagdur á at marknaðarføra felagið og føroyska ferðavinnu, bæði her heima og úti í heimi.

- Øll hesi ár, eg havi starvast á flogvøllinum og hjá Atlantsflogi, er nógv broytt, bæði við fasilitetum á flogvøllinum og við flog-førum, sigur sølu-og mark-naðarfulltrúin.